# Vánalig útlit í løtuni

**Tað sær einki út fyri upsa- og hýsumarknaðinum í løtuni, sigur virkisleiðarin á flakavirkinum Norðís á Eiði**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Tað eru eingi útlit fyri hýsuella upsamarknaðinum, sum eru tey fiskasløgini, mest verður arbeitt av á Norðís á Eiði, sigur virkisleiðarin, Petur Mohr*

Bæði upsa og hýsumarknaðurin eru vánaligir í løtuni, meðan nakað betri stendur til við toskinum, sigur Petur Mohr, virkisleiðari á flakavirkinum Norðís á Eiði.

Á Eiði arbeiða tey mest hýsu og upsa, sum verða skorin til flak og fryst. Tó verður nakað av saltfiski eisini arbeitt, men ikki í so stóran mun, sigur virkisleiðarin.

Tað er nokk at gera á virkinum, sigur Petur Mohr. Tey arbeiða hvønn dag og frysta niðurfyri. Men ikki er lætt at sleppa av við hýsuna, sigur hann, tí goymslurnar í Englandi, hagar selt verður, eru fullar.

Hýsan verður eisini seld til USA, meðan upsin fer til Týsklands og Fraklands.

Toskurin, sum keyptur verður, verður allur saltaður, sigur Petur Mohr. Sumt verður flakt, meðan annað verður skorið til flak. Tann flakti slatfiskurin verður seldur til Spoania, meðan italienarar meira eita saltaða flakið, sigur virkisleiðarin á Norðís.

Tað plagar ikki at vera vanligt á Norðís at arbeiða upsa hesa árstíðina, sigur Petur Mohr. Men hýsuprísurin ger, at neyðugt er at keypa upsa eisini fyri at hava nakað av arbeiði. Tað hevur verið meira vanligt at arbeiða upsa um summarið, sigur hann.

Alt, sum arbeitt verður á Norðís, verður keypt um fiskamarknað Froya, sigur Petur Mohr virkisleiðari á Norðís á Eiði.

Norðís er partur av einum størri samtaki við fýra virkjum, sum somu eigarar eiga. Tey eru virkið í Hvalba, í Sørvági, á Eiði og eitt í Klaksvík.

Petur Mohr sigur, at í Hvalba verður nakað av feskum sent av landinum, meðan tey bara frysta á Eiði, umframt tað lítla av saltfiski, arbeitt verður har. Í Klaksvík og í Sørvági verður nógvur saltfiskur arbeiddur, sigur hann.

# Betri egningarmaskina

**Norska fyritøkan Mustad hevur saman við fyritøkuni Dyrkorn, sum ger línur, betra um kendu egningarmaskinuna, og gjørt eina útgávu til smærri bátar. Maskinan varð víst fram í Føroyum í sienastu viku**

TØKNI
*Edvard Joensen*



*Svein Erik Bakke frá Dyrkorn, Leif Erik Drøffel frá Mustad og Poul Andreas Milladal frá J.F. Kjølbro vístu egningarmaskinuna fram*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað er í grundini áðrenn tað kemur til sjálva egningina, at broytingar verða gjørdar í egningarmaskinuni, sigur Svein Erik Bakke, sølustjóri í fyritøkuni Dyrkorn, sum samstarvar við Mustad um ábøturnar á egningarmaskinuni.

Øll skipanin er sett saman frá rulluni og til sjálva egningarmaskinuna í hinum endanum. Og tað er í dragingini, at stóru broytingarnar eru gjørdar, sigur Svein Erik Bakke.

Fyrr var tað soleiðis, greiðir hann frá, at línan fór líkasum gjøgnum eitt hol, áðrenn hon varð stokkað upp. Tað gjørdi, at húkarnir ofta stóðu fastir ymsastaðni, og sami trupulleikin kundi eisini verða av bæði spleisingum og ikki minst fløkjum.

Nú er skipanin broytt soleiðis, sigur hann, at ein magnetskipan er gjørd, sum fangar húkarnar og leiðir teir beinleiðis »magasinið«, og á tann hátt slepst undan nógvum trupulleikum.

Eisini er sjálvt »magasinið« gjørt arbeiðsligari. Nú slepst undan at lyfta tað av og á stativið. Tað verður nú bara flutt á skinnarum, soleiðis at nú kann ein einsamallur maður klára tað, greiðir Svein Erik Bakke frá.

Skipanin, teir nú hava gjørt, er roknað til smábátar. Tað vil siga hesar, sum einsamallur maður rør út við, greiðir hann frá.

Um sjálva egningarmaskinuna sigur, hann, at har eru eisini gjørdar ávísar ábøtur. Okkurt er tikið burtur, og hjálpt er upp á ymsar trupulleikar og rættað her og har.

Fyrr var skipanin gjørd av aluminium, men tað tærdist illa, sigur Svein Erik Bakke. Hendan bøtta skipanin er øll gjørd úr rustfríum stáli, og tað skuldi so gjørd hana nógv betri, metir hann.

Tað verður kravt av bátunum í framtíðini, sigur hann, at alt skal vera rústfrítt, so tað er lætt at røkja, umframt at tað heldur betri enn aluminium.

Eisini høvdu norðmenninir línu, teir gera sjálvir, við sær at vísa føroyingum.

Tað var serliga eitt línuslag við plaststopparum fyri svøvlarnar, teymarnir eru festir í, sum føroyingar vístu stórnáhuga fyri, segði Svein Erik Bakke. Og sjálvandi vóru Mustadhúkarnir á øllum línum.

Tað kostar ikki heilt einki at fáa eina slíka skipan umborð. Tann lítla skipanin, teir vístu fam í einum stórum lastbili, kostaði umleið 450.000,- norskar krónur, segði Svein Erik Bakke.

Tað er J.F. Kjølbro í Klaksvík, sum umboðar egningarskipanina í Føroyum.



Kristian Magnussen:

# Vánaligt lógarsmíð



*Størstu politisku flokkarnir eru ójavnir á máli um, hvørt barsilsskipanin er nóg góð ella ikki. Alfred Olsen úr sambandsflokkinum vil vera við, at tað eru fólk, sum parið av Eiði, ið koma at gjalda tær sparingar, ið skulu gerast, men Bjarni Djurholm er av teirri áskoðan, nú eru øll javnstillað - bæði tímalønt og alment lønt*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum metir, at barsilsskipanin er als ikki nóg góð, tá bólkar í samfelagnum, kunnu missa 5000 krónur í barsilspeningi frá degi til dags. – Tað er vánaligt lógarsmíð, sum ger, at fólk kunnu koma illa fyri, sigur Kristian Magnussen**

BARSILSBROYTING
*Ingrid Bjarnastein*

Í Sosialinum í gjár skrivaðu vit um Jane og Allan av Eiði, sum hava mist slakar 5000 krónur í barsilspeningi. Áðrenn nýttárið, tá barsilsskipanin varð broytt, var upphæddin góðar 13.000 krónur um mánaðin, men nú nýggja útrokningsgrundarlagið kom í gildi, minkaði barsilspeningurin so mikið, at Allan og Jane helst verða noydd at fara út aftur at arbeiða, sjálvt um dóttirin, Emilia, bert er fýra mánaðir gomul.

– Tá fólk koma so illa fyri í barsilsskipanini, so er hon ikki nóg góð. Hetta er eisini tað, sum vit brúktu nógva orku at ávara samgonguna ímóti, men har var hvørki til at høgga ella stinga í, sigur Kristian Magnussen.

Áðrenn skipanin varð broytt vóru tað teir seks best samanhangandi mánaðirnir, sum vóru útrokningsgrundarlag fyri barsilspeninginum. Á nýttárinum kom nýggja skipanin í gildi, sum sigur, at tað eru tólv teir bestu mánaðirnir, sum verða útrokningsgrundarlag.

– Hasir seks mánaðirnir vóru nevniliga settir upp á handan hátt, so tey tímaløntu ikki skuldu verða ov illa fyri. Tað gongur ringast útyvir tey, sum hava hart kropsligt arbeiði og eru tímalønt, sigur Kristian Magnussen, sum sigur, at øll leggja ikki í, at øll hava ein rímiligan kjans at lívbjarga sær.

– Vit mugu hugsa um, at børnini eru framtíðin, og vit hava ikki so stórt yvirskot av børnum í Føroyum. Onkustaðni er tað undirskot.

Kristian Magnussen heldur, at tað er vánaligt lógarsmíð, at nakar kann koma so illa fyri sum Jane og Allan. Hann er av teirri áskoðan, at sjálvandi skuldi nýggja skipanin ikki verið galdandi fyri tey, sum longu eru í henni.

Bjarni Djurholm:

# Øll eru javnstillað

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, heldur, at skipanin er nóg góð sum hon er. – Tá útrokningargrundarlagið var seks mánaðir, so gav tað í nógvum førum fleiri nógv meira pening, enn tað tey veruliga átti at fáa, og tað kann ikki vera rætt, sigur landsstýrismaðurin. 1. januar vórðu øll javnstillað, sum eru í skipanini. Bæði tey, sum vóru í henni áðrenn nýggja lógin kom í gildi, og tey, sum komu í aftaná**

BARSILSBROYTING
*Ingrid Bjarnastein*

– Skipanin er samanskrúva á tann hátt, at tú skalt fáa pening samsvarandi til mista løn yvir eitt ár, og tað var eisini upprunauppskotið. Tað varð síðani broytt til at vera seks teir bestu mánaðirnir faldaðir upp til eitt ár. Hetta førdi við sær, at fleir fingu ein fyrimun av at útrokningargrundarlagið var so stutt, og komu tískil at fáa eina hægri inntøku enn tey høvdu fingið tá tey arbeiddu, og hetta kann ikki vera rætt, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum.

Bjarni Djurholm vísir á, at tí varð avgjørt at fara aftur til upprunauppskotið, uttan at man gjørdi skipanina verri.

– Øll, bæði tey, sum vóru í skipanini áðrenn ársskiftið, og tey, sum eru komin í hana eftir ársskiftið, vórðu javnstilla tann 1. januar. Hetta var gjørd fyri, at tey, sum vóru í skipanini áðrenn ikki skuldu fáa meira í barsilspeningini í mun til hini, sum komu í skipanina aftaná tey, greiðir landsstýrismaðurin frá.

Hann ásannar tó, at ongin skipan er fullborin, og skjótt verður ein nevnd sett at kanna barsilsskipanina og lofta møguligum holum. Men Bjarni Djurholm heldur tó, at skipanin er nóg góð sum hon er.

– Eg skal viðganga, at tað er óheppið, at fólk hava roknað út frá einum skeivum grundarlagið. Men annars er skipanin góð. Talan er ikki um eina sosiala skipan, men um eina arbeiðsmarknaðarskipan, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, sum at enda vísir á, at áðrenn skipanin kom í gildi, so var onki fyri tey tímaløntu.

Alfred Olsen:

# Hatta fór at henda

**– Vit vístu á, at um útrokningargrundarlagið í barsilsskipanini varð broytt, so fór tað at viðføra eina lækking fyri tey løgst løntu, sigur Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum**

BARSILSBROYTING
*Ingrid Bjarnastein*

– Hetta nýggja útrokningargrundarlagið ger, at tað verða níggju til tíggju milliónir spardar. Vit vóru ímóti at broyta lógina, og tí heldur halda fast upp á teir seks mánaðirnar, sum vóru útrokningargrundarlag, sigur Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum.

Alfred Olsen heldur, at dømi, sum var í Sosialinum í gjár, var typiskt fyri, tað ið minnilutin vísti á fór at henda.

– At tað fór at verða so ógvusligt framgongur bara á hasum døminum um parið á Eiði, heldur Alfred Olsen.

Sambandsmaðurin vísir á, at barsilsskipanin skal geva teimum, ið eru í henni, tað, tey missa í løn ígjgønum eitt ár. Og heldur hann, at hetta hevur katastrofalar fylgjur fyri tey lægst løntu.

– Hatta skuldi ikki komið fyri. Í lógini stendur í §3, at lógin hevur virknað fyri tey, ið verða foreldur eftir 31. desember 2002. Men í stykki tvey, verður sagt, at tey, sum eru í skipanini áðrenn 31. desember 2002, koma eftir 1. januar undir sama útrokningargrundarlag, sum tey, sum verða foreldur eftir ársskifti. Hatta er bert ein máti at rættvísgera, tað, at summi fáa minni pening enn tey fingu áðrenn, heldur Alfred Olsen.

– Hatta er ein vánalig broyting til eina skipan, sum annars er góð. Tað eru tey, sum eru í somu støðu, sum parið á Eiði, sum koma at gjalda ein stóran part av sparingunum, sigur Alfred Olsen at enda.

Kristina Háfoss:

# Skipanin er góð

**Kristina Háfoss úr Tjóðveldisflokkinum heldur, at tað er harmiligt, at fólk kunnu koma í eina støðu, sum tey á Eiði. Men sjálv heldur hon, at barsilsskipanin er nóg góð sum hon er**

BARSILSBROYTING
*Ingrid Bjarnastein*

– Tað er sjálvandi harmiligt, at ávís fólk koma í so ringa støðu sum parið á Eiði, men vit mugu eisini minnast til, at vit hava eina av heimsins bestu barsilsskipanum, sigur Kristina Háfoss úr Tjóðveldisflokkinum.

– Nógva staðni kring okkum hava fólk barnsburðarfarloyvi í eitt stytri tíðarskeið enn vit hava, har tey bara fáa 70-80% av lønini aftur.

Kristina Háfoss vísir á, at útrokningargrundarlagið nú er vorðið til tað, tað er í øðrum skipanum.

– Lógin áðrenn gav meira til fólk, ið áttu at fáa minni pening, og tað er so ein spurningur um tað er rætt. Eg haldi heldur, at vit eiga at gleðast um, at barnsburðarfarloyvið er longt upp í 12 mánaðir, harav seks av teimum eru við løn.

– Skipanin í sær sjálvum er eitt stórt framstig, og arbeitt verður eisini við at fáa teir seinastu seks mánaðirnar við løn ígjøgnum árini.

Um tað, at tey lægst løntu møguliga vera verri fyri, sigur Kristina Háfoss, at tað var uppi at venda í tinginum, men nýggja útrokningargrundarlagið ikki neyðturviliga gevur teimum lægst løntu minni.